# Reinsa fiskaolju fyri dioksin

*Seinastu tíðina hevur nógv verið at hoyrt um, at ES vil áseta sera lág markvirðir á dioksini í fiskaolju og harvið eisini í fóðri til alifisk*

Danskir framleiðarar av fiskamjøli og fiskaolju hava tikið stig til eina pilotverkætlan, har nýggur framferðarháttur verður nýttur at reinsa dioksinir úr fiskaolju. Endamálið við verkætlanini er, at finna út av, um fiskaolja kann reinsast við aktivum koli. Endamálið er eisini at kanna um reinsingin ávirkar haldbarið og góðskuna á fiskaoljuni.

Oljan verður reinsað, meðan hon er rá stórar nøgdir av olju skulu reinsast. Framferðarhátturin er tí ikki tann sami, sum tá olja frá t.d. toskalivur verður reinsað. Um so er, at hesin framferðarháttur vísir seg at vera egnaður til at reinsa dioksin úr fiskaolju, og vinnan eisini kann nýta henda framferðarhátt, verður neyðugt við einum skiftistíðarskeiði soleiðis, at virkini fáa tíð til at leggja framleiðsluna um til nýggju tøknina.

Danski verkætlanarleiðarin væntar, at ES vil bíða við at áseta markvirðir fyri dioksinir í fiskaolju til verkætlanin er liðug og virkini hava havt tíð at broyta framleiðsluna (partvís út Fiskaren).

# Tilbúgvingarætlan fyri fiski- og alivinnuna

Alt størri dentur verður lagdur á m.a. matvørutrygd og umhvørvi. Norska fiski- og alivinnan hevur tí ásanna, at tørvur er á eini skipan, sum kann taka sær av kreppum, ið kunn stinga seg upp í samband við sjómat, sum verður útfluttur. „Eksportutvalget for fisk“ hevur í hesum sambandi átikið sær at uppbyggja eina tilbúgvingarætlan fyri norska vinnuna.

Fyri sjómat, eins og aðrar matvørur, vísa fjølmiðlar, keyparar, áhugabólkar og myndugleikar ein kritiskan áhuga fyri vørunum. Tí hevur vinnan tikið stig til at byggja upp eina skipan, sum kann handfara slíkan atfinningarsaman áhuga fyri matvørutryggleika, umhvørvi, politikki og búskaparligum tilknýti, sum vinnan hevur.

Allur atfinningarsamur áhugi, um hesin er rímuligur ella ikki, krevur, at vinnan er før fyri at samskifta effektivt við tey, sum keypa vørurnar, um so er at trupulleikar stinga seg upp, sum ávirka søluna av fiskavørum beinleiðis, ella eru við til at umdømið á sjómati versnar.

Endamálið við tilbúgvinarætlanini fyri sjómat er at fáa eina professionella skipan at taka sær av trupulleikunum, og at henda skipanin skal geva norsku fiski- og alivinnuni kappingarfyrimunir í mun til aðrar aktørar á marknaðinum.Tað verður undirstrikað frá norsku vinnuni, at tilbúgvingarætlanin er ætlað sum ein skipan, sum skal taka sær av trupulleikum, ið kunnu raka allar aktørar í fiski- og alivinnuni. Trupulleikar, sum einstakir aktørar hava, mugu teir sjálvir taka sær av, so leingi teir ikki raka vinnuna sum heild.

Í nærmastu framtíð skal Eksportutvalget for fisk vísa skipanina fyri vinnuni, myndugleikunum og øðrum við tilknýti til vinnuna.

**(Kelda: Vinnuhúsið)**



*»Krúnborg« og »Chr. í Grótinum« hava fingið væl av svartkjafti seinastu túrarnar*

# Fáa nógvan svartkjaft í løtuni

*»Krúnborg« og »Christian í Grótinum« hava fingið væl av svartkjafti og prísurin er rímiligur. Hinir nótabátarnir royna flest allir eftir lodnu í íslendskum sjógvi, meðan »Norðborg« er í Barentshavinum. Øll manningin liggur í løtuni við herviligum beinkrími*

ÓLAVUR Í BEITI

»Krúnborg« og »Chr. í Grótinum« hava fingið væl av svartkjafti seinastu túrarnar. Teir hava roynt suður vestur úr Írlandi, í ES sjógvi, og landað í Fuglafirði. »Chr. í Grótinum« var fyrradagin við 2000 tonsum, og »Krúnborg« landaði 2500 tons í gjár. Teir eru báðir farnir nýggjan túr aftur. Og prísurin hevur eisini verið brúkligur, 55 oyru kilo.

Teir flestu av hinum nótabátunum eru í løtuni og royna eftir lodnu í íslendskum sjógvi. Tað hevur verið væl at fingið við troli, men ikki hevur borið so væl til við nót.

**Øll manningin sjúk**

Einasti føroyski nótabátur, sum roynir í Barentshavinum eftir lodnu er »Norðborg«, og sum skilst á reiðarínum, hevur verið meiri at fingið har. »Norðborg« hevur gjørt tveir túrar, hvør 1200 tons. Seinasta túr skræddi teir nótina nakað illa, og tá ið teir fóru inn í Tromsø at landa og bøta, legðist øll manningin við herviligum beinkrími.

Fyrradagin vóru tveir av manningini hjá lækna, og fingu teir penicilin fyri lungnabruna, men sum skilst, eru fleiri á fótum aftur og støðan er í batningi umborð, verður sagt.

**Ein túr aftrat**

»Norðborg« ger helst ikki meiri enn tann eina túrin aftrat, tí »Gardar« verður longu yvirtikin tann 20. februar, og tá fær hann navnabroyting til »Norðborg«.

Reiðaríið arbeiðir í løtuni við at selja núverandi »Norðborg« uttanlands, og sum skilst á reiðarínum, eru samráðingar í løtuni við felag í Afrika.

# Sáttmálasamráðingar í Danmark

Umleið 67% av danska arbeiðsmarknaðinum er fevnt av nýggjum sáttmála. Sáttmálarnir eru gjørdir fyri 4 ár, og skuldi tí givið vinnuni góðar møguleikar at leggja ætlanir. Partarnir meta, at avtalan tey næstu 4 árini kemur at kosta arbeiðsgevarum umleið 4% í hægri lønarútreiðslum, ella í meðal umleið 1% um árið. Harafturat kemur úrslitið frá teimum árligu lokalu lønarsamráðingunum á virkunum.

Innihaldið í semjunum líkist, og her verður í høvuðsheitum greitt frá innihaldinum, sum kemur í gildi í sáttmálaskeiðnum:

Tann vanliga arbeiðstíðin kann í framtíðini verða í tíðarskeiðnum frá kl. 6.00 til kl. 18.00 uttan, at tað skal gjaldast eyka fyri hetta. Samstundis verður ásett, at tað er møguleiki fyri, at arbeiðstíðin kann ásetast við viku-, mánaðar ella árs-støði. Møguleiki verður eisini fyri, at ásetingarnar í sáttmálanum kunnu frávíkjast, um semja er um hetta á tí einstaka virkinum, og avtalan kann góðkennast av báðum sáttmálapørtum.

Partarnir hava avtalað (DI/CO) at arbeiða fyri einum felags sáttmála fyri arbeiðs- og starvsmannaøkið um eina stiðvísa samskipan fyri „Industriens Overenskomst“ og »Industriens Funktionæroverenskomst«. Endamálið er, at teir seinni skulu verða til 1 sáttmála. Heitið arbeiðari og starvsmaður verður í høvuðsheitum broytt til samstarvsfólk (medarbejder).

Fimm frítíðardagar koma í staðin fyri tann eina frítíðardagin og teir 3 barnafrídagarnir fyri starvsfólk við minst 9 mánaðum starvsaldri. Tað vil siga, at frá 2. mai 2003 hava starvsfólkini rætt til 5 árligar frítíðardagar.

Eftirlønargjaldið hækkar til dømis úr 5,3% til 9,0%, hjá ávísum bólkum til 8,1%. Lønin fyri teir fyrstu 14 dagarnir í barnsburði hækkar pr. 1. maj 2000 til í mesta lagi 120 kr. um tíman og pr. 1. maj 2003 verður veitt full løn. Løn undir sjúku verður hækkað úr 4 vikum til 5 vikur.

Lønin fyri fyrsta sjúkradag hjá barninum hækkar til fulla løn.

Lægsti tímasatsurin, sum var kr. 80,40, hækkar við 2 kr. hvønn tann 1. mars 2000, 2001 og 2002. Viðbøtur verða javnaðar við 5% í miðal tað fyrsta árið, og 2% tað triðja árið. Partarnir eru samdir um at samráðast um takstirnar fyri lægstu tímaløn og viðbøtur í januar 2003 fyri tað fjórða sáttmálaárið uttan møguleika fyri arbeiðssteðgi.

**(Kelda: Vinnuhúsið)**

# Hús brunnu í grund

*Eini gomul sethús í Leirvík brunnu í grund mánanáttina*

SVEINUR TRÓNDARSON

Um tveytíðina mánamorgunin fekk løgreglan boð um, at eldur var í einum gomlum sethúsum í Leirvík.

Sløkkiliðið fekk boðini beinanvegin, men sum vit skilja var einki at gera hjá teimum. Húsini stóðu í ljósum loga, og eingin vón var um at fáa sløkt eldin.

Tá vit tosaðu við løgreglustøðina í Runavík fyrrapartin mánadagin var greitt, at húsini vóru brunnin í grund.

